gult cyan magenta svart



# Ítróttur

e-mail: jakup@sosialurin.fo
Sosialurin - Box 76 - 110 Tórshavn - Tlf. 31 18 20 - Fax 31 47 20

**Lesið eisini ÍtróttaSosialin á alnetinum:**
**www.sosialurin.fo**

# 3rd Tórshavn International

*Flóvin Tór Næs fekk javnleik móti Irina Krush, og annars eydnaðist nærum øllum føroysku telvarunum at fáa stig í fimta umfarinum av stóru talvkappingini í Norðurlandahúsinum*

5 umfar í 3rd Tórshavn International var eitt gott umfar hjá føroyingunum í kappingini. Tað eydnaðist øllum at fáa stig, uttan Olafi Berg, sum tapti móti landsliðstelvaranum Ólavi Simonsen.

John Arni Nilssen helt javnt móti altjóða meistaranum Leif Erland Johannesen, tá hann í endatalvinum við manni minni fekk ævigt skák.

Flóðin Tór Næs telvaði javnt móti Irinia Krush USA, sum gjørdist víðakend eftir at hava skotið upp ein leik fyri restina av heiminum, í talvinum móti Kasparov á alnótini. Heimsmeistarin segði eftir talvið, sum hann vann, at um heimurin hevði fylgt hennara uppskoti, var talvið helst enda javnt. Hetta nervaði tó ikki Flóvin, sum tók av jøvnum aftaná heilar 165 leikir!

Eisini Carl Eli Nolsøe Samuelsen fekk eitt gott úrslit tá hann telvdi javnt í yvirkantinum móti John Rødgaard.

Besti føroyingurin eftir fimta umfar er sostatt skopuningurin og fyrsta borð á landsliðnum, **John Arni Nilssen**, við **2,5 stigum**.

Í toppinum var sera spennandi talv millum oddafiskin og stórtalentið Grischuk RUS og nummar tvey Ponomariov UKR. Hvørgin hevði tapt nakað talv higartil og báðir høvdu víst sannførandi telving í heimsklassa. Tað var russarin Grischuk sum endaði omaná, í einum hvøssum og hugtakandi álopstalvið. Hann lat fólkið hjá sær standa í deyða, og fór heldur beint eftir konginum hjá Ponomariov. Hetta eydnaðist til fulnar, tá hann loksins megnaði at seta mótsøðumannin hjá sær í eitt sjáldsamt og vakurt kvalt mát.



*Talvini verða víst á skýggjum, so til ber at fylgja við*
***Mynd: Faroechess.com***

**Grischuk RUS** er einsamallur á odda við **5 stigum**.

Honum á baki kemur **Baburin IRL** við **4 stigum**.

Telvað verður aftur mikudagin 11/10 klokkan 13:00 í Norðurlandahúsinum.


**STATOIL Færøyene AS søkir**

**íbúð**

Í sambandi við oljuleiting søkja vit eftir eini íbúð í Tórshavn til eitt av útlendsku starvsfólkum okkara.

Vit kundu hugsað okkum eitt 2-ára leigumál, ið møguliga kann verða longri. Íbúðin má vera tøk í seinasta lagi 1/1-2001.

Íbúðin má vera í góðum standi við í minsta lagi 2-3 sovikømurum.

Vendið tygum til John Inderhaug á tel 34 35 00 ella skrivliga til:

STATOIL Færøyene AS
att. John Inderhaug
Viðarnes, Postboks 3098
110 Tórshavn

STATOIL

**STATOIL Færøyene AS søkir høli til**

**skrivstovu**

Í sambandi við oljuleiting søkja vit eftir skrivstovuhølum miðskeiðis í Tórshavn. Hølini skulu vera um 300 m$^2$.

Vit kundu hugsað okkum eitt 3-ára leigumál, ið møguliga kann verða longri. Hølini mugu vera tøk í seinasta lagi 1/1-2001.

Hølini mugu vera í góðum standi og helst hava pláss fyri parkering.

Vendið tygum til John Inderhaug á tel 34 35 00 ella skrivliga til:

STATOIL Færøyene AS
att. John Inderhaug
Viðarnes, Postboks 3098
110 Tórshavn

STATOIL


# FK-Flogbóltskapping 2000

*FK-kappingin hjá flogbóltsfelagnum,Fleyr, spæld*

Um vikuskiftið varð árliga 20 manslið og 21 kvinnulið luttóku. , og vórðu dystirnir leiktir í Gundadalshøllini, Eysturskúlanum, Læraraskúlanum og á Stórheyggi.

Av tí at FK-kappingin og Mjølnir kappingin eru avgerandi fyri, hvør skal spæla steypafinalurnar, sum verða í mars mánaði, vórðu bæði 1. og 2. deild avgreiddar leygardagin.

Fleyr kvinnurnar vóru einaráðandi í 1. deild, og vunnu tær finaludystin móti Nøvuni. Hinvegin var 1. deild hjá monnum meira spennandi. Fleyr og SÍ hittust í finaluni, og tá avtornaði, varð tað SÍ, sum dróg longra stráið.

Sunnudagin skuldu finalurnar hjá meistaradeildini so avgerast. Spælt varð á langbana, og vórðu nýggju reglurnar nýttar. T.v.s at spælt verður best av 5 settum við running score, og er neyðugt við 5. settinum, verður hetta leikt upp í 15, eisini við running score.

Í finaluni hjá meistaradeildini hittust Fram og Mjølnir, og her vann Mjølnir uttan stórvegis hóvasták 3-0.

Kvinnufinalan stóð ímillum Mjølnir og Drátt, sum í ár er styrkt við útlendskum leikara. Tey bæði fyrstu settini fullu til vágagenturnar, meðan Mjølnir fór avstað við 3. settinum. 4. settið leikaði sera javnt á, men endin varð kortini, at Dráttur vann settið og harvið eisini finaludystin.

Komandi vikuskiftið fara flogbóltsliðini aftur í eldin, tá fyrsta umfar av landskappingini er á skránni.



*Vinnarar av meistaradeildini hjá kvinnum gjørdist Dráttur, eftir at tær í finaluni vunnu sera spennandi dystin móti Mjølnir*



*Mjølnir vann tryggan 3-0 sigur í finaludystinum móti Fram, og hevur við sigrinum tryggjað sær luttøku í steypafinaluni, sum verður leikt í mars mánaði, komandi. Tað sama hava kvinnurnar hjá Drátti*

gult cyan magenta svart



# Dreingjadeildin hjá HB, gull verd

*Tað er ongantíð áður komið fyri, at eitt og sama felag hevur vunnið gull í øllum dreingjadeildunum*

Hóast tað ikki eydnaðist HB at vinna FM-heitið í fremstu deildini, so hava tey í eldra havnarfelagnum onga orsøk til at vera misnøgd um farna kappingarárið.

## Bert gull

Tað eydnaðist nevnliga HB, sum fyrsta felag nakrantíð, at vinna gull í øllum dreingjadeildunum.

Harumframt vann felagið eisini kappingina hjá smágentum, umframt at tær HB genturnar, sum hava aldur til gentur 14-17 ár, vóru partur av B36 liðnum, sum vann kappingina í tí aldursbólkinum.

Og so ikki at gloyma steypakappingarnar, har HB hesu ferð streykt avstað við trimum steypum

## Takka stuðlunum

Á hesari síðu hava vit prentað myndir av dreingjaliðunum, sum hava vunnið meistaraheitið til felagið. Myndirnar hava vit fingið frá heimasíðuni hjá HB.

Vegna leiðsluna í felagnum skulu vit í sama viðfangi bera eina serstaka tøkk til teir venjarar, sum hava tikið tøkini í ungdómsdeildunum, umframt at ein serstøkk tøkk verður veitt Oddmar Andreassen fyri ótroyttiliga arbeiði hansara sum samskipari.

Sosialurin ynskir HB hjartaliga tillukku við úrslitunum.



*Piltarnir eru her avmyndaðir eftir seinasta dystin á árinum, sum var móti KÍ. Standandi frá vinstru eru Áki Davidsen, venjari, Ólavur S. í Ólavsstovu, Pætur Jørgensen, Christian Mouritsen, Bjarki Vágstún, Jákup Slættalíð, Dánjal Davidsen, Jóhan Petur Høj, Tróndur Sigurðsson, Egil Jacobsen, venjari Fremst f.v. Hanus Samróð, Ragnar Egilsson, Jákup Larsen, Janus Sørensen, Niclas Eysturoy og Ingvard Vang*



*Smápiltar, avmyndaðir á Argjum eftir seinasta finaluumfarið. Standandi frá vinstru: Jákup Højgaard, Bergur Niclasen, Bjartur Nielsen, Ellindur Ólavsson, Sjúrður Thomassen, Hans Bjarni Lervig og Janus Mortensen. Húkandi frá vinstru eru Pætur Mortensen, Høgni Djurhuus, Christian í Garði, Dánjal Jákup Hansen, Búi P. Dalsgarð og Óla Jákup Dahl*



*Dreingir, avmyndaðir í Havn aftan á seinasta dystin á árinum. Dreingirnir vunnu eisini steypakappingina. Aftast frá vinstru eru Heidar Heidarsson, venjari, Ransin N. djurhuus, venjari, Niels Poulsen, Eli Thorsteinsson, John Poulsen, Frank Poulsen, Rókur Jespersen, Jón Clementsen, Bárður Joensen, Julian Frandsen, Dan Torleifsson, Ólavur Dalsgaard, Pætur Á. Jacobsen Fremst frá vinstru. Christian Eli Zachariassen, Roy Poulsen, Bjarni Jørgensen, Rani d. Christiansen, Leif H. Jacobsen, Rúni Patursson, Knút Dalsgaard, Regin Fossaberg, Sverri Tórstún*



*Smádreingir, sum eisini vunnu steypakappingina, avmyndaðir á Sandi eftir seinasta dystin. Standandi: Pætur Clementsen, venjari, Allan Enghamar, Svenn F. Jacobsen, Hjalti M. Jacobsen, Rani Gregoriussen, Hans A. Thomsen, Heri Olsen, Kristian Gustafsson, Páll M. Joensen, Jóhan E. Mouritsen Húkandi, Emil N. Leifsson, Søvlv Hansen, Pól T. Dam, Pól Andreasen, Gunnar Nielsen, Gunnar H. H. Haraldsen, Jónas Stenberg, Arnbjørn Theodor Hansen, Bárður Mittelstein*



*Unglingarnir eru her avmyndaðir eftir steypafinaluna, sum teir eisini vunnu. Aftast f.v. Eyðun Dahl-Christiansen, Ransin N. Djurhuus, Jan Arnskov, Pætur D. Jacobsen, Jón Rói Jacobsen, Pætur Dahl, Kristian Jensen, Bárður Mikkelsen, Teitur Ellingsgaard Fremst f.v. Bjarni Jørgensen, Tony Rasmussen, Martin Thomassen, Danny Rasmussen, Magni Thomsen, Vagnur M. Mortensen, Allan Michelsen og Bárður Christiansen*


**HVUSSU STENDUR TIL?**



Nýggj kunningartænasta til Havnafólk. Her fært tú nærri at vita um byggiloyvi, dagstovnar og hegnskyldu - snøgt sagt kunning um allar tænastur og øll tilboð til fólk í Tórshavnar kommunu. Ring 31 51 60 ella kom inn í avgreiðsluna við Vaglið.

**SNARSKIVAN**
- greið boð um Havnina